# SUMBIAR KOMMUNA

## STÝRISGERÐABÓK 2017

## 02/06-2017-05

| | |
|---|---|
| **Fundur nr. 05**<br>Tíð: **02. juni. 2017, kl. 17:00**<br>Stað: **Kommunuskrivstovan** | Notis: |
| 16.01 - 13.02 - 13.03 - 20.04 - 22.05 - 30.06 - 14.08 - 11.09 - 09.10 - 20.11 - 18.12 | <u>Møttir:</u><br>Eyðbjørn Thomsen<br>Frits Poulsen<br>Brynleif Bech<br>Niclas Hentze<br>Rúni Lisberg |

| | |
|---|---|
| **Mál nr. 01/05**<br>• **Tekning av Samkomuhúsinum.** | • Einmælt samtykt at taka undir við 3-4 uppskotinum frá Jákup Midjord. |
| **Mál nr. 02/05**<br>• **Hoyringsskriv í samband við týning av rottu.** | • Kunna var um hoyrings skrivið, og var ongin viðmerking til hetta. |
| **Mál nr. 03/05**<br>• **Samstarvsavtala millum Politimeistaran í Føroyum og Sumbiar kommunu um upptøku av leysum hundum og øðrum djórum í Sumbiar kommunu.** | • Samtykt var at taka undir við hesu avtalu. Bíða verður til góðkenning fyriliggur frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni og Landsdjóralæknanum. |
| **Mál nr. 04/05**<br>• **Umbøn frá skúlaleiðaranum í Sumbiar skúla um samstarv við Vágs skúla** | • Sumbiar kommuna vil hava eina niðurstøðu frá skúlastýrinum hesum viðvíkjandi<br>Sumbiar kommuna vil ikki hava, at nakrir tímar verða fluttir úr Sumbiar skúla vegna hetta samstarvið. |
| **Mál nr. 05/05**<br>• **Tilboð uppá ketu rundan um minnisvarðan.** | • Samtykt at taka av hesum tilboðið, undantikið tilboðið uppá uppsetan av ketuni. |
| **Mál nr. 06/05**<br>1. **Umsókn um byggiloyvið á matr. nr. 266b.**<br>2. **Umsókn um byggiloyvið á matr. nr. 76.**<br>3. **Umsókn um byggiloyvið á matr. nr. 290b.**<br>4. **Um byggiloyvið á matr. nr. 208a.**<br>5. **Umsókn um byggiloyvið á matr. nr. 194.**<br>6. **Umsókn um byggiloyvið á matr. nr. 167a.**<br>7. **Umsókn um byggiloyvið á matr. nr. 176.** | 1. Einmælt samtykt eftir innsendum umsókn og skitsum.<br>2. Einmælt samtykt eftir innsendum skitsu og umsókn.<br>3. Einmælt samtykt eftir innsendum umsókn og skitsum.<br>4. Einmælt samtykt eftir innsendum umsókn og skitsum.<br>5. Einmælt samtykt eftir innsendum umsókn og skitsum.<br>6. Einmælt samtykt eftir innsendum umsókn og skitsum. Treyta av at grannaloyvið fyriliggur.<br>7. Einmælt samtykt eftir innsendum umsókn og skitsum. |

| | |
|---|---|
| **Mál nr. 07/05**<br>• **Uppskot til brúksavtalu viðv. húsi í Akrabyrgi hjá Mentamálaráðnum.** | • Samtykt at undirskriva hesa avtalu. Sumbiar kommuna hevur sett nakrar paragraffir inn í hesa avtalu, um so er, at Mentamálaráðið góðkennir hesar paragraffir, so verður skrivað undir. |
| **Mál nr. 08/05**<br>• **Umsókn um byggiloyvið á matr. nr. 67a** | • Umsóknin var fyri á fundi. Sumbiar kommuna vil hava eina betri tekning uppá bygningin, eitt nú er eingin hædd á. Eisini má SEV takast við í hesu viðgerð. Málið er útsett til ein fullfíggja tekning fyriliggur. |
| **Til støðutakan / kunning.**<br>• **Skattainntøkurnar fyri apríl/mai**<br>• **Taðingarætlan.**<br>• **Broddur.**<br>• **Fyrispurningur um bungurnar.**<br>• **Kunning um mál nr. 03/03 frá 30.03.2016, skaði nr. 235158.**<br>• **Ruddingardagur.** | • Kunna var um skattainntøkurnar. Skattainntøkurnar fyri apríl 2017 vóru 692.105,- kr. í mun til 789.583,- kr. fyri apríl 2016, ella -97.478,- kr. (-12,35%) slakari í 2017.<br>Skattainntøkurnar fyri mai 2017 vóru 836.689,- kr. í mun til 682.073,- kr. fyri mai 2016, ella 154.616,- kr. (22,76%) betri í 2017.<br>Inntøkurnar fyri jan. – mai 2017 eru 3.852.948,- kr. í mun til sama tíðarskeið 2016, 3.610.122,-kr. Sostatt eru inntøkurnar vaksnar við 242.826,- kr. ella 6,73% í 2017 í mun til 2016.<br>• Taðingar ætlanin var samtykt, festarin skal halda seg til kunngerðina um taðing tá taða verður. Kunngerð nr. 72 frá 29. mai 2012 um taðing<br>Við heimild í § 4, stk. 1, § 6, stk. 2, § 7, § 13, § 35, stk. 2, § 35 a, § 37, stk. 3, § 39, stk. 2 og § 72, stk. 3 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 25. frá 14. mai 2008 og nr. 128 frá 22. desember 2008, verður ásett:<br>• Kunnað var um Brodd. Báturin er settur í stand. Samtykt var at keypa bjargingarvestar til Brodd.<br>• Fyrispurningur frá E.T, Bungurnar verða fluttar sum áður samtykt -, men bungur verða eisini lagdar í sunnara borð.<br>• Kunna var um svar frá Tryggingini.<br>• Ruddingardagur verður leygardagin 17.06.17. |
| **Til lukkaðan fund.**<br>• | |

Fundurin lokin kl. 20:30

Eyðbjørn Thomsen | Frits Poulsen

Rúni Lisberg | Niclas Hentze | Brynleif Bech

SUMBIAR SÓKNAR KOMMUNA